# Løgtingið fær ikki høvi at siga sína hugsan í undirgrundarmálinum

*Yvirtøkan av ráevnunum í undirgrundini, sum formliga fer fram mánadagin, tá Atli Dam og Poul Schlüter undirskriva avtaluna, verður hastað ígjøgnum sum einhvør onnur avgreiðslusøk*

Mánadagin undirskriva Poul Schlüter forsætisráðharri vegna danska ríkisstýrið og Atli Dam løgmaður vegna landsstýrið undir sáttmálan um at føroyska heimastýrið yvirtekur ráevnini í føroysku undirgrundini.

Sjálvt um ein samd marknaðarnevnd hevur samtykt at áleggja landsstýrinum at kunna løgtingið um avtaluna um yvirtøku og marknaðartrætuna við bretar, so letur landsstýrið ikki við seg koma.

Hósdagin fyrrapartin – mitt undir tingfundi – kallaði formaðurin í marknaðarnevndini til fundar har løgmaður var møttur. Edmund Joensen marknaðarnevdarlimur sigur, at nevndin har fær at vita, at avtalan skuldi undirskrivast mánadagin, tá Poul Schlüter kom higar.

– Í hálvan tíma varð okkum givin ein frágreiðing, um man kann nevna hesa talu so. Men alt samanumtikið sýnir hetta, hvussa lítla virðing, samgongumeirlutin í marknaðarnevndini og landsstýrið hava fyri tinginum. Málið um yvirtøku av ráevnunum í undirgrundini verður ikki lagt fyri tingið, men bara hastað ígjøgnum sum einhvør onnur avgreiðslusøk í landsstýrinum, sigur Edmund Joensen.

pól



**Poul Schlüter, forsætisráðharri, undirskrivar yvirtøkusáttmálan saman við løgmanni mánadagin**



**AFTALE**
**mellem Danmarks regering og Færøernes Landsstyre**
**om råstoffer i undergrunden**

1. Med hjemmel i lov nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre § 3, jfr. liste B pkt. 3, overføres sagsområdet "råstoffer i undergrunden" til færøsk særanliggende.

2. I medfør af hjemmestyrelovens § 4 overtager hjemmestyret den lovgivende og administrative myndighed på området.

3. I overensstemmelse med hjemmestyrelovens § 2 overtager hjemmestyret de med sagsområdet forbundne udgifter.

4. I overensstemmelse med hjemmestyrelovens § 5 er hjemmestyrets kompetence undergivet de begrænsninger, der følger af rigets internationale forpligtelser.

5. Nærmere aftaler inden for rammerne af nærværende aftale, i forbindelse med at sagsområdet overføres til færøsk særanliggende, træffes mellem Færøernes landsstyre og de pågældende ressortministerier.

6. Eventuelle indtægter fra fremtidig råstofindvinding vil udløse forhanlinger om nedsættelse af statens tilskud til Færøerne.

Regeringen har konstateret, at Færøernes landsstyre er indstillet på, til gavn for såvel færøske som danske samfunds- og erhvervsinteresser - forudsat konkurrencedygtighed - at anvende sagkundskab indenfor dansk forvaltning og forskning samt i danske erhvervsvirksomheder i den færøske råstofudvikling.

Tórshavn, den 1992

For Statsministeriet — For Færøernes landsstyre

Poul Schlüter / — Atli P. Dam /

# 13 útlendsk skip á Føroyaleiðini

## Av teimum vóru tey 9 russisk

Talið á útlendskum fiskiførum, sum royna í føroyskum sjóøki, hevur henda seinasta mánaðin verið millum 3 og 13 um dagin, upplýsir Færøernes Kommando í tíðindaskrivi um tað, sum fram er farið hjá donsku sjóverjuni í tíðarskeiðinum frá 16. november til 17. desember í ár. Henda seinasta dagin vóru tilmeldað 9 russisk og 2 fronsk fiskifør. Haraftrat vóru í føroyskum sjóøki 1 japanskt og 1 eingilskt havrannsóknarskip.

Sjóverjuskipini »Beskytteren« og »Vædderen« hava hesa tíðina gjørt kanningar um borð á 1 fronskum, 1 eingilskum, 2 russiskum og 8 føroyskum fiskiførum.

Sjóverjuflogfarið hevur á eftirlitsferðunum yvir føroyskum sjóøki ikki verið varugt við ólógligan fiskiskap.

### Bjargingartiltøk

Týsdagin 15. desember kl. 12.11 komu boð til Færøernes Kommando um, at eitt flogfar við 2 motorum áleiðis til Vágar hevði trupulleikar við øðrum motorinum. FRK boðsendi beinan vegin tyrluni hjá »Veðrinum« at fara til Vágar at hjálpa í møguligari neyðstøðu. »Veðrurin« var tá staddur einar 70 fjórðingar sunnan fyri Suðuroynna. Kl. 12.45 varð boðað frá til FRK, at flogfarið hevði sett seg í Vágum í øllum góðum, og tyrlan vendi so aftur til »Vædderen«.

16. desember varð MRCC TORSHAVN sett í gongd í sambandi við bjargingina av teim 5 umkomnu frá syndarligu tyrluvanlukkuni á Borðoyarvík, tá »Vípan« hjá Strandferðsluni datt niður.

Sjóverjan hevur ongar sjúklingaflutningar havt henda seinasta mánaðin.

### Hjálparveitingar

19. november kl. 08.40 varð fráboðað til Færøernes Kommando, at línubáturin »Rókhamar«, staddur 50 fjórðingar í ein útsynning úr Akrabergi, hevði fingið ein leka. »Beskytteren«, sum lá fyri akker í Runavík, fór beinan vegin at sigla móti staðnum fyri at koma nærri, so tyrlan kundi fara avstað, tí vandi var fyri, at skipið sakk. Kl. 09.15 kundi sjóverjutyrlan fara avstað við eyka pumpum, sum síðani vórðu loraðar niður á »Rókhamar«. »Beskytteren« fylgdi honum so á Klaksvík.

21. november kl. 08.25 fór útróðrarbáturin »Kristnes« at leka í Kalsoyarfirði. Aftur fór tyrlan av »Vædderen« avstað við eykapumpum, og tveir aðrir bátar togaðu »Kristnes« á Klaksvík, upplýsir P. Müller tíðindaovasti á Marinustøðini í tíðindaskrivinum, har hann samstundis vegna Færøernes Kommando ynskir gleðilig jól og gott nýggjár.

▲

*Bobby Fischer*

# Møguliga alt til fánýtis

*Amerikansku myndugleikarnir vilja hava Bobby Fischer dømdan fyri brot á ST-handilsbannið móti Jugoslavia*

**Stóri talvdysturin fyri kortum millum Fischer og Spasskij, hevur nú fingið álvarsligar avleiðingar fyri vinnaran, Bobby Fischer.**

**Hóast hann fekk góða umtalu og lummarnar fullar av dollarum, so er líkt til, at hann missir alt og meira aftrat.**

Amerikansku myndugleikarnir hava nú boðað frá, at Bobby Fischer skal handtakast, tí hann er ákærdur fyri brot á ST-handilsbannið, ið amerikanska stjórnin var við til at seta Jugoslavia.

### Staddur í Beograd

Í løtuni er talvserfrøðingurin staddur í høvuðsstaðnum í fyrrverandi Jugoslavia, Beograd, har hann hevur verið síðani tiltikna talvdystin.

Stóri spurningurin er so, um myndugleikarnir í samveldinum vilja útflýggja Fischer til amerikansku myndugleikarnar. Um tað verður veruleiki, so er ikki nógv gott í væntu hjá talvserfrøðinginum.

Hann kann rokna við at verða sera hart revsaður. Amerikanskar keldur vilja vera við, at hann fær 10 ára fongsulsrevsing, 250.000 kr. í bót og at hann missir allan peningin hann fekk fyri talvsigurin.

### Hart móti hørðum

Hann varð ávarðaður áðrenn hann fór til krígs herjaða landið, men hetta tók hann bert í spølni. Á pressufundi áðrenn talvdystin, vísti hann sína ónøgd við at spíta á brævið hann hevði fingið frá amerikansku stjórnini.

Men nú hava so amerikumenn sett hart upp ímóti hørðum.

D



**Bobby Fischer er nú í álvarsligum trupulleikum. Fer hann aftur til Amerika, verður hann óivað hart revsaður fyri brot á ST-handilsbannið móti Jugoslavia**

## 5000 íslendingar arbeiðsleysir

REYKJAVÍK (Sverrir Þ)

**Arbeiðsloysið í Íslandi er vaksandi.**

Yvirlit frá arbeiðsávísingarskrivstovum um støðuna á arbeiðsmarknaðinum við novemberlok vísir, at tá vóru 5000 fólk arbeiðsleys.

Tað vil siga, at 3,9% av landsins arbeiðsorku var uttan arbeiði av nøkrum slag. ▲

# Ódn eisini í Íslandi

## Ein maður funnin útideyður

REYKJAVÍK (Sverrir Þórðarson)

**Í fleiri dagar hevur verið ódnarveður við kavaroki á Norðlandinum og Vestfirðum.**

Fleiri staðni, m.a. á Siglufirði, máttu fólk rýma frá húsi og heimi orsakað av vanda fyri skalvalopi. Skúlarnir hava verið afturlatnir nakrar dagar, tí skalvar hava forðað allari ferðslu eftir vegunum.

Hósdagin visti ríkisútvarpið at siga, at ein 66 ára gamal bóndi, sum búði fyri seg sjálvan nakað norðan fyri býin Blönduós á Norðlandinum, var útideyður. Bjargingarfólk, sum vóru farin at leita eftir manninum, funnu líkið í kavanum 75 metrar frá garðinum, millum garðin og seyðhúsið.

Nú um vikuskiftið er spáað lágætt, lýggjari veður og regn. ▲

# Grønlendingar keypa gamlan ísl. nótabát

## Skal avreiða lodnu í Íslandi

REYKJAVÍK (Sverrir Þórðarson)

**Eitt grønlendskt reiðarí í Ammassalik hevur í Íslandi keypt eitt gamalt nótaskip, sum fyrr í tíðini var við í lodnuveiðuni. Tað skal grønlendska reiðaríið eisini brúka skipið til.**

Gamla nótaskipið er merkt 300 tons, men hevur ikki verið í brúki síðani umleið 1977. Tað hevur fingið navnið »Ammasat«. Manningin verður íslendsk.

Tá skipið verður klárt at fara á lodnuveiðu, skal tað landa til verksmiðjur í Íslandi. ▲

# Danmarks-nyt (RB)

### Finansloven vedtaget

Finansloven for 1993 blev torsdag vedtaget efter en udramatisk debat. Seks partier står bag vedtagelsen, nemlig alle med undtagelse af SF og Fremskridtspartiet, der begge stemte imod. Alle var stort set enige om, at der ikke bliver gjort tilstrækkeligt for at få has på arbejdsløsheden, men flere fandt dog, at der med den nye finanslov er præsenteret nye initiativer i så henseende. De omfatter bl.a. en fremrykning af store investeringer i bolig- og byfornyelse, nye vej- og jernbaneinvesteringer, samt lån til kommunerne til renovering af gamle kloakledninger.

### Første levertransplantation i Århus

Den første levertransplantation på Århus kommunehospital blev torsdag gennemført med et godt resultat. Hermed er Rigshospitalets hidtidige monopol på den type operationer blevet brudt. Ved en ni timer lang operation fik en tysk statsborger indopereret en ny lever, som stammede fra en landsmand. Det skete som følge af det samarbejde, som Århus kommunehospital har med hospitalet Eppendorfer Krankenhaus i Hamborg

### Strenge narkotika-straffe

To mænd og en kvinde blev torsdag idømt fængselsstraffe på mellem 8 og 13 år for indsmugling af op til 43 kg. amfetamin. Den 31-årige Jørgen Ebbesen fik som bagmand den rekordstore straf på 13 års fængsel, mens den 30-årige Jan Olsen blev idømt 12 års fængsel og den 26-årige Anita Larsen fik otte års fængsel. De dømte ankede strafudmålingen til Højesteret.

### Håndværkere stævner bank

En gruppe på 10 håndværkere udtog torsdag stævning mod Baltica Bank med et samlet erstatningskrav på op til 15 mio. kr. Håndværkerne mener, at banken lod dem arbejde videre for entreprenørgruppen Sophienberg i flere måneder, selv om banken vidste, at entreprenøren var økonomisk langt ude. Baltica Bank var selv med til at udløse konkursen i august, og det efterlod håndværkerne med en stribe ubetalte regninger. Men helt frem til selve konkursen lod banken håndværkerne forstå, at entreprenørens økonomi var i orden.

### Rørbombe sprængt på butikstorv

En kraftig rørbombe blev kort før midnat sprængt på et butikstorv under et højhus på Kløvervej 37 i Kolding, hvor den anrettede voldsomme skader, oplyser politiet. Bomben bestod af et kraftigt 36,6 cm langt rør af rustfrit stål. Diameteren var 4,2 cm, og rørets vægge var 1,2 cm tykke. »Det er heldigt, at ingen mennesker kom noget til. Det er den kraftigste rørbombe, jeg nogen sinde har set, og en håndgranat ville ikke have anrettet større skader«, siger den vagthavende hos politiet i Kolding.



**JÓLAKEYP.** Jólini nærkast. Hósdagin er jólaaftan. Skulu vit røkka at gera alt klárt til jóla, so má keypast inn nú. Teir fáu handlar, sum eftir eru, eru stúgvandi fullir av vørum. Summi ikki bara keypa inn til jóla, men av tí at komið er fram, at nógvar vørur verða munandi dýrari eftir nýggjár, verður keypt niðurfyri. Onnur, serliga keypmenn við góðum royndum innan handilsvirksemi, vilja vera við, at einki er at óttast fyri, tí prísirnir verða munandi lægri, tá vit koma inn í nýggja árið, av tí at vørugoymslurnar í Europa eru á tremur í løtuni.

*Mynd: Diml./Thomas.*

**Fiskavirkir í Vestmannaoyggjum:**

# Keypa grønlendskan tosk

## Trolari skal landa fast har

REYKJAVÍK (Sverrir Þórðarson)

Tvey fiskavirkir í Vestmannaoyggjunum keyptu nú ein dagin veiðuna, 500 tons av toski, sum grønlendski trolarin »Tasermiut« hevði veitt í Barentshavinum.

Morgunblaðið greiðir frá, at tey bæði fiskavirkini í Vestmannaoyggjunum samráðast nú við reiðaríið hjá trolaranum um, at hann skal avreiða 300 tons av toski frá fiskimiðunum í Barentshavinum hvønn mánað. Framsøgumaður fyri annað fiskavirkið, Vinnslustöðina, sigur í Morgunblaðnum, at samráðst verður um ein prís, sum verður um 100 ísl. kr. fyri kilo (slakar 10 føroyskar).

Grønlendski trolarin landar toskin heilfrystan og avhøvdaðan. ▲